DANISH HEALTH
AUTHORITY

# Sig ja til koppseting móti beinkrími

## Tað er ein skilagóð avgerð



Koppsetingin er ókeypis hjá øllum, sum eru eldri enn 65 ár, og hjá borgarum, sum liva við kroniskari sjúku, ella á annan hátt eru í serligum vandabólki.

Bílegg tær tíð til koppseting hjá lækna tínum, ella har tú plagar at verða koppsettur.

Beinkrím er ein virussjúka, sum kann raka øll. Hjá nøkrum kann sjúkan vera serliga álvarslig og kann gerast lívshóttandi.

Tí ber til at verða koppsettur móti beinkrími ókeypis, um tú ert eldri enn 65 ár, livir við kroniskari sjúku, ella á annan hátt ert í serligum vandabólki.

Tú kanst bíleggja tær tíð til koppseting hjá læknanum, ella har tú plagar at verða koppsettur.



## Hvat er beinkrím?

Beinkrím er ein sera smittandi virussjúka, sum smittar við smáum dropum, ið koma frá hosti og njósi og av flatum, ið eru dálkaðar við virusi. Ert tú eldri enn 65 ár, livir tú við kroniskari sjúku, ella ert í serligum vandabólki á annan hátt, kann sjúkan versna álvarsliga, kann enda við innlegging á sjúkrahúsi og kann í ringasta føri vera lívshóttandi.

## Hvønn fevnir tilboðið um ókeypis koppseting um?

Hesi eru fevnd av tilboðinum um ókeypis koppseting:

- Øll, sum eru eldri enn 65 ár
- Fólk við ávísum kroniskum sjúkum
- Barnakonur í 2. og 3. burðartíð (trimester)
- Tey sum eru ovurtung
- Fyritíðarpensjónistar
- Onnur fólk í serligum vandabólkum
- Starvsfólk í heilsu- og røktargeiranum, ið starvast við at røkta, taka sær av og viðgera borgarar, sum eru í serligum vanda fyri álvarsliga sjúku av beinkrími.

Ivast tú í um tú, ella ein av tínum næstu eru í hesum bólkum, kanst tú seta teg í samband við læknan. Læknin kann hjálpa tær at meta um, um tað er neyðugt hjá tær at verða koppsettur.

## Hvussu verði eg koppsettur?

Fyri at verða koppsettur, skalt tú ringja til læknan, ella tað staðið har tú vanliga verður koppsettur. Koppsetingin krevur einans eina vitjan.

**Bílegg tær tíð til koppseting móti beinkrími -
hjá læknanum ella har tú plagar at verða koppsettur.**

**Les meira:**

**sst.dk / influenza**